


## EB/Streymur basti NSÍ

Ein vinardystur var á skránni í gjárkvøldið, tá felagsliðið EB/Streymur tók ímóti NSÍ. Leygardagin vann NSÍ á júst EB/Streymi við Løkin, men nú var vent í holuni. EB/Streymur fekk eina dreymabyrjan uppá dystin, og í hálvleikinum høvdu tær longu avgjørt dystin, tá teir førdu heili 4-0. Ronnie Samuelsen legði EB/Streym á odda. Hanus Eliasen økti til 2-0, áðrenn Ronnie aftur var uppá spæl og økti til 3-0. Nakað undan steðginum økti Arnbjørn Hansen upp í 4-0. Í seinna hálvleiki pyntaði NSÍ um úrslitið, tá Øssur Dalbúð fekk minka um munin til 4-1, sum eisini gjørdist endaliga úrslitið.

## Tottenham vann á Everton

Tað hevur ikki gingið serliga væl hjá Tottenham á útivølli í ár. Undan dystinum ímóti Everton í gjárkvøldið hevði Tottenham bert vunnið ein dyst á útivølli, men móti Everton eydnaðist aftur at vinna. Berbatov legði Tottenham á odda í fyrra hálvleiki, men Arteta javnaði beint fyri hálvleik við beinleiðis frísparki. Henda støðan helt sær líka til ein minutt fyri leiklok, tá Jenas var uppá spæl fyri Tottenham, og sostatt fingu teir sín næsta útisigur í kappingarárinum. Botnliðið, Watford, tók eisini ímóti Wigan í Premier League í gjár, og hesin dystur endaði við javnleiki 1-1.

# Avloysarin hjá Tomislav er komin

**Umstøðurnar gera, at eg noyðist at vera heima. Men eg vóni, at eg aftur fái ein møguleika at koma til Føroya, sigur Tomislav Sivic. Ístaðin er ein kenningur hjá Tomislav komin til Vágs**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

- Tað eru ikki allir lutir, sum vit sjálvi fáa gjørt av.

Soleiðis sigur Tomislav Sivic, nú tað endaliga er staðfest, at hann ikki kemur til Føroya á hesum sinni.

Orsøkin er sjúka á familjuni, og sum støðan er, hevur venjarin gjørt av, at hann ikki átekur sær nakra uppgávu yvirhøvur.

- Tað er sjálvandi keðiligt. Eisini hjá VB/Sumba, sum kom í eina keðiliga støðu av hesum. Men teir skilja tíbetur mína støðu.

- Men eg harmist eisini um hetta sjálvur. Eg hevði nakrar møguleikar fyri venjarastarvi í heyst, men eg valdi VB/Sumba, tí bæði eg og familjan ynsktu at koma aftur til Føroya. Tað gekk so ikki á hesum sinni, men vónandi verður ein nýggjur møguleiki hjá mær eina aðru ferð, sigur Tomislav, sum annars letur eina heilsu til vinir og kenningar her í Føroyum.



*Privatar umstøður gjørdu, at Tomislav Sivic ikki kemur til Føroya á hesum sinni. Men sjálvur vónar hann, at ein nýggjur møguleiki seinni kann stinga seg upp*

### Nýggi venjarin er komin

Spælararnir hjá VB/Sumba hava tó vant við fullari ferð. Jóan Pauli Olsen hevur staðið fyri fyrstu venjingunum í góðan mánað, og í gjár kom so nýggi venjarin til landið.

Hesin eitur Predrag Prsic, og hann hevur í fleiri førum arbeitt saman við Tomislav Sivic.

Eisini kom Dmitri Jankovic til landið í gjár, so allur hópurin er upp á pláss, nú farið verður undir seinasta partin av fyrireikingunum til nýggja kappingarárið.

Kyndil-StÍF 22-22 (12-12)

# StÍF nærkast hálvfinalunum

**Kyndil líktist einum vinnara ímóti endanum av dystinum í bestu kvinnudeildini, men síðstu løtuna fekk StÍF bjarga sær javnleikin, sum helst tryggjar teimum seinasta plássið í hálvfinalunum**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

StÍF og Kyndil hava ligið og kappast um fjórða plássið í Sunset kappingini hjá kvinnum í at kalla alt ár, og í gjárkvøldið skuldi so avgerðin fella, um hvat av liðunum skuldi fáa tað seinasta plássið í hálvfinalunum í landskappingini.

Undan dystinum lá StÍF tvey stig frammanfyri Kyndil, og tí skuldi Kyndil vinna dystin, fyri at tær skuldu hava møguleika at fáa StÍF aftur.

### Eingin munur

Fyrri hálvleikur bleiv sera spennandi. Kyndil fekk eina betri byrjan uppá dystin, tá tær løgdu seg á odda við trimum málum alt fyri eitt. So við og við fótaði StÍF sær tó, og ikki gekk long tíð, fyrrenn tær bæði vóru komnar uppá javnleik og høvdu lagt seg á odda.

Kyndil visti tó, at tær skuldu vinna dystin. Tær svaraðu skjótt aftur, og so gekk sera javnt á restina av hálvleikinum. Munurin var ongantíð meir enn tvey mál, og tá liðini fóru til hálvleiks stóð eisini á jøvnum 12-12.

### Kyndil líktist einum vinnara

Gestirnir inni av Strondum fingu eina betri byrjan uppá seinna hálvleik, tá tær løgdu seg á odda við tveimum málum fyrstu tveir minuttirnar. Hetta skelkaði tó ikki Kyndil á nakran hátt. Tær spældu sítt spæl, og tá 10 minuttir vóru farnir av seinna hálvleiki vóru tær aftur á odda. Nú vóru tað tær, sum vóru oman á. Tær førdu í fleiri førum við einum máli, men hvørja ferð eydnaðist strandakvinnum at svara aftur.

Átta minuttir fyri leiklok eydnaðist enn einaferð StÍF at javna, men so fekk Kyndil brádliga tvey mál á rað, so tá fimm minuttir vóru eftir at spæla, førdi Kyndil við tveimum málum, og nú líktust tær brádliga einum vinnara.

StÍF vildi tó ikki geva skarvin yvir. Tær kempaðu til tað síðsta, og tað eydnaðist eisini hjá teimum at tryggja sær javnleikin. Dysturin endaði 22-22, og sostatt liggur StÍF enn á tí týdningarmikla fjórða plássinum, sum gevur atgongd til hálvfinalurnar.

## FAKTA

**Kyndil-StÍF 22-22 (12-12)**
**Málskjúttar:**
**Kyndil:** Jacklin Durhuus 8, Lina Andriulyte 5, Randi Wardum 5, Anja Heinadóttir 2, Ronja Mikkelsen 2 (1)
**StÍF:** Rebekka Justinussen 8 (1), Ninna K. Johansen 6 (1), Rósa Johansen 3, Bára B. Danielsen 2, Fríðrun Danielsen 2, Sólfríð Christiansen 1
**Brotskøst:** Kyndil 1, StÍF (4)

# Eingin brasilskur styrkur til B36

**Nýggi áleyparin royndi seg í venjingardystinum móti HB, sum B36 tapti 1-0. Niðurstøðan er, at hann neyvan er maðurin, sum skal styrkja B36-álopið. Enn er Sylla tó ein møguleiki, sigur Kristjan á Neystabø**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá tað stóð mest sum greitt, at Amed Davy Sylla ikki kemur aftur til Føroya, royndu tey í B36 at styrkja um álopið á aðrar mátar. Ein brasiliumaður hevur um vikuskiftið vant við felagnum, og mikukvøldið var hann partur av liðnum, sum tapti 1-0 móti grannunum úr HB. Málið hjá HB skeyt Kári Nielsen.

- Tað verður helst ikki hesin maðurin, sum skal styrkja um álopið hjá okkum. Hann dugir nøkur ting, men politikkurin hjá okkum er, at skal ein nýggjur maður takast inn, skal hesin vera munandi betri enn teir, sum vit longu hava. Tær treytirnar meta vit ikki, at hesin maðurin lýkur, og tí verður neyvan talan um sáttmála, sigur Kristjan á Neystabø, stjóri í FC Tórshavn.

### Sylla lúrir enn

Føroyska transfer-vindeygað letur aftur í morgin, og tí er ikki hugsingur hjá B36 um at leita sær eftir nýggjum møguleikum. Hinvegin hevur felagið enn sáttmála við Sylla, sum tó ikki er komin til landið enn.

- Hvussu verður við Sylla, vita vit ikki heilt. Men í praksis verður hann uppfataður sum eina spælari, sum bara ikki er møttur til venjing. Vit hava sáttmála við hann, og spæliloyvið liggur her, so hann fær ikki spælt fótbólt aðrastaðni. Í løtuni eru tó nøkur persónlig viðurskifti, sum forða honum í at koma aftur til Føroya, men broytast hesi viðurskifti, so hevur hann loyvi at spæla fyri B36.

- Og vit meta okkum enn hava ein sterkan hóp. Sjálvandi kundu tingini sæð øðrvísi út, um vit høvdu vita um støðuna hjá Sylla í betri tíð, men eg ivist tó onga løtu í, at vit eisini í ár medda høgt, sigur Kristjan á Neystabø